LM-011/2025

Gunnvá Ellendersen

Fra: Etiskaradid
Sendt: 11. august 2025 08:49
Til: Løgmálaráðið
Emne: Viðmerkingar frá Etiska ráðnum til uppskot til løgtingslóg um sterilisatión og kastratión

Til Løgmálaráðið
v. Elsu Magnussen, fulltrúa

Góða Elsa,

Her viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um sterilisatión og kastatión.

Orsaka tíðarfreistina.

- Sambært viðmerkingunum til § 3 (s. 16), eigur ein kvinna "ikki at verða noydd at fullføra viðgongutíðina um vanligi vandin í viðgongutíðini og føðingini er øktur". Skotið verður upp, at hetta verður umorðað, soleiðis at brotið ístaðin vísir til, at kvinnan eigur at kunnu fyribyrgja viðgongutíð via sterilisatión. Núverandi orðing kann nevniliga leggja upp til at steðga viðgongutíðini, tá hon longu er byrjað, ístaðin fyri at fyribyrgja hana áðrenn hon byrjar, sum endamálið við sterilisatión er. Orðavalið kann sostatt elva til óhóskandi bland millum sterilisatión og fosturtøku/abort.

- Sambært viðmerkingunum til § 3 (s. 16) fevnir ásetingin um kvinnur eldri enn 25 ár. Men sambært § 2 hava allar kvinnur yvir 25 ár longu rætt til sterilisatión uttan loyvi. Eigur § 3 tí ikki í staðin at fevna um kvinnur undir 25 ár, ella um kvinnur undir 30 ár, um umhugsunartíðin skal kunna strikast?

Vinaliga,

Katla Heðinsdóttir
fakligur skrivari

Bergur D. Joensen
formaður

ETISKA RÁÐIÐ
Etiska ráðið
Varðagøta 9 • FO-100 Tórshavn
Tel. +298 219484
er@er.fo • www.er.fo